


## Silkeborg eyðmýkti Brøndby

Føroyski landsliðsspælarin Christian Lamhauge Holst og liðfelagar hansara í Silkeborg endaðu 2009 við einum stórsigri á heimavølli. Brøndby var á vitjan, og teir blágulu máttu heimaftur úr Silkeborg við einum 3-0 tapi. Talan er um fjórða ósigurin á rað hjá Brøndby. Brøndby hevði annars ein risastóran málmøguleika at leggja seg á odda tíðliga í dystinum, men Martin Bernburg misnýtti opna málmøguleikan. Beint undan steðginum hevði Christian Lamhauge Holst ein stóran málmøguleika, men hann fekk ikki nóg nógva ferð á skotið, og Stephen Andersen fekk vart fyri. Í seinna hálvleiki gekk sum eftir ánni hjá Silkeborg. Tann altíð vandamikli, Rajko Lekic, Martin Svensson og Jesper Bech syrgdu fyri teimum trimum málunum hjá Silkeborg. Gamla verjukempan hjá Silkeborg, Steven Lüstü spældi sín seinasta dyst í dag, og vóru liðfelagarnir sera fegnir um, at hann kundi enda yrkisleiðina á hægsta støði við einum stórsigri á Brøndby. Silkeborg heldur vetrarferiu á einum fjórðaplássi. Silkeborg hevur 29 stig fyri 18 dystir.

# Fleyr vann fimmsettaran

**Eftir at hava tapt tríggjar fimmsettarar, hevur Fleyr nú vant seg við drúgvaru dystirnar og vann leygardagin annan fimmsettaran á rað, tá liðið var á vitjan í Sørvági**




Hilmar Jan Hansen



Sí hevði møguleikan at avgera dystin ímóti Fleyr í bæði fjórða og fimta setti, men megnaði tað ikki, og tí hava havnarmenninir av álvara meldað seg inn í kappingina

Mynd: Álvur Haraldsen

Fyri nøkrum viku síðani kundi staðfestast, at Fleyr í Eikliguni hjá monnum ikki megnaði at fáa nakað burtur úr teimum drúgvaru dystunum, tí tað altíð vóru mótstøðuliðini, ið fóru avstað við fimta setti. Men fyri viku síðani kom Fleyr sum vinnari burtur úr fimmsettara ímóti ÍF á heimavølli, og leygardagin bar aftur til, tá fimm sett skuldu til fyri at vinna á SÍ á útivølli.

### SÍ helt ikki fast

SÍ sá út til at leggja væl út og var á odda 18-13 í fyrsta setti, men tapti allíkavæl. Í øðrum og triðja setti lá betur fyri hjá sørvingum, ið vunnu bæði sera trygt, so nú ráddi bara um at gera dystin av í fjórða setti og taka sigurin.

Men hóast SÍ kom á odda 16-11 og seinni var á odda 19-16, bar ikki til at halda fast. Seks teir næstu bóltarnar koyrdi SÍ út, upp undir loftið ella aðrastaðni, har tað ikki gav stig, og so endaði tað við, at Fleyr stakk av við settinum, so tað nú stóð á jøvnum 2-2 í settum.

Nú tóktist Fleyr at standa í kendu støðuni, tí hetta var fimti fimmsettarin í vetur. Og sum settinum leið, sá eisini út til, at tað fyri fjórðu ferð skuldi gerast tap. SÍ var á odda 8-4, tá liðini skiftu síðu, og løtu seinni var støðan 9-5. Men so setti Fleyr endaspurtin í gongd, samstundis sum SÍ legði størri dent á døming enn spæl, og tí gjørdust havnarmenninir teir drúgvaru og tóku bæði settið og sigurin.

Nú stigini verða býtt í helvt, er Fleyr tí væl nærri einum finalusessi enn frammanundan, samstundis sum SÍ í síðstuni tykist hava mist stevið. Mjølnir er framvegis á odda, hóast liðið misti stigini, tað helt seg hava vunnið ímóti ÍF fríggjakvøldið.

## Fakta um Eik-liguna

**Kvinnur**

| | | |
|---|---|---|
| SÍ-ÍF | 3-0 | (25-17, 25-9, 25-9) |
| Dráttur-Fleyr | 1-3 | (16-25, 21-25, 25-22, 18-25) |
| TB-KÍF | 3-0 | (26-9, 25-9, 25-16) |

**Menn**

| | | |
|---|---|---|
| SÍ-Fleyr | 2-3 | (23-25, 25-14, 25-14, 22-25, 11-15) |
| ÍF-Mjølnir | 0-0 | (kolldømdur av Flogbóltssambandinum) |

# Hinar renna aftan á SÍ

**Einki óvæntað úrslit var um vikuskiftið í Eikliguni hjá kvinnum, har sørvágskvinnur framvegis eru greitt á odda, meðan Mjølnir og Fleyr eru fremst í kappingini um at renna aftaná**




Hilmar Jan Hansen

Nú flogbóltskappingin hevur fingið nýggjan leist, so sjálvt meistaraheitið skal avgerast við FM-finalum, sum vit kenna tað frá hondbóltskappingini, er líka umráðandi at gerast nummar tvey sum nummar eitt, tá sjálv landskappingin er spæld.

Tí er kvinnukappingin blivin ein kapprenning um at renna aftan á SÍ, ið bert hevur útbygt leiðsluna frá byrjan. Og í løtuni bendir alt á, at tað verða annaðhvørt Mjølnir ella Fleyr, ið skulu takast í finalunum, men eisini TB liggur og lúrir beint aftan fyri hini bæði.

### Eingin ivi hjá SÍ

Burtur sæð frá fyrsta setti, tá SÍ ikki ordiliga var komið í gongd, var lítil spenningur um, hvønn veg dysturin í Sørvági í gjár skuldi fara, tí ÍF megnaði ongantíð at hótta heimaliðið. ÍF kom hampuliga væl frá fyrsta setti, meðan SÍ gjørdi fleiri feilir, enn vanligt er at síggja. Men í teimum báðum seinnu settunum koyrdi tað sum knívur í bleytum smøri hjá sørvágskvinnum, ið vóru tryggar í spælinum, samstundis sum ÍF hevði ilt við at fáa bóltarnar yvir um aftur netið.

### Maja basti ikki Fleyr

Hóast Dráttur hevur fingið styrk, nú Maja Popovic er komin á liðið, var tað ikki nóg mikið til at steðga Fleyr á Giljanesi leygardagin. Maja byrjaði sum kantur í fyrsta setti, men spældi síðani sum hevari, men hóast Dráttur fekk tikið triðja sett, rakk tað ikki til meira enn tað. Fleyr hevði greitt fleiri streingir at spæla uppá í álopsspælinum, og eisini eydnaðist væl at blokka hóttaninar frá Drátti, so tí liggur Fleyr framvegis væl fyri í kappingini har frammi.

### Tryggur TB-sigur

Tvørákvinnur fingu í gjár sín fjórða sigur til høldar, tá KÍF var á vitjan í Trongisvági, og munurin var so mikið stórur, at tað ongantíð gjørdist spennandi, men var liðugt eftir 50 minuttum. Sum vant, stríddust ungu KÍF-kvinnurnar væl á gólvinum, men fingu ongantíð gongd á álopsspælið, meðan TB spældi væl og enntá kundi geva teimum ungu á bonkinum kjansin, uttan at tað gjørdi sigurin minni tryggan.